**Lag: Kurt Foss / Reidar Bøe**

**Nánd**

**1.**

```
   F                  B            D7
Í djúpasta dali eg gekk eina tíð,
     Gm                        C7
har fann onga gleði, bert møði og stríð.
    F        A7          B           Bm
Tá løtur so tungar og móti tað sveik
       F            G7          Gm  C7  F
mær bønin hon kendist so lítil og veik.
```

**2.**

Men Jesus tú hoyrdi og svaraði mær,
tí aldri tú blundar, men altíð meg sær.
Tú lær meg ei stúra, men líta á teg
og ferðast so tryggur á sannleikans veg.

**3.**

Úr trongd míni hjálpti úr skuggana dal,
mín máttleysa sál aftur mentist so val.
So tungur í huga men tú gavst mær mátt
tí lær meg at stríðast, ei falla í fott.

**4.**

Nú gleðist mítt hjarta, og prís fái hann,
hans favnur var opin og aftur meg vann.
Har heima í himli vit møtast eindag
tá glaður skal syngja eitt fagnaðarlag.

*Árni Jacobsen*